Tónleikakappingin FM'08

Hvør er Føroya feitasti bólkur ella einstaklingur?

Síðan tónleikakappingin Prix Føroyar fór í søguna, hevur verið stórur saknur hjá teimum ungu og nýggju bólkunum, at fáa møguleika at standa á palli og framføra egnan tónleik og ikki minst at fáa fokus frá bæði miðlum og áhoyrarum. Nógvir eru festivalarnir í landinum, men har er ringt at sleppa fram at og eru tað mest tey stóru nøvnini, sum spæla.

Fm'08 er ein tónleikakapping í Margarinfabrikkin skipar fyri, har bólkarnir fáa møguleika at framføra sín tónleik og fáa møguleika at gerast Føroya besti bólkur. Tónleikararnir fáa okkurt at venja fram ímóti og vera teir meira motiveraðir, at gera egnan tónleik, at vera sæddir og fáa dirvi til at halda áfram, við tí sum teir gera.

Við tónleikakappingini verður skapað eitt tónleikarikt og kreativt umhvørvi, niðri í býnum og á Margarinfabrikkini, har ljós verður varpað á føroyskan tónleik av øllum slagi.

Hvar: á Reinsarinum í Tórsgøtu 22. og 29. november. 6. desember verður finalan, sum eisini er á Reinsarinum.

Hví melda seg til: Vinningurin er 5 dagar í Studio Oyravox við teknikara.

Hvussu: Fyri at vera við í kappingini skal bólkurin ella einstaklingurin ikki hava givið nakra útgávu út.

Hvør bólkur fær 15 minuttir á pallinum, har bólkurin í minsta lagi framførir 2 egin løg, í øllum genrum.

Síðan verður ein dómsnevnd, sum velur hvør bólkur sleppur víðari til finaluna. 3. bólkar sleppa víðari hvørja ferð.

Í finaluni er so ein størri dómsnevnd, sum velur Føroya besta bólk.

Tilmelding á www.myspace.com/fm08tonleikakapping ella á fm08@fabrikkin.fo

# Hálv millión til neyðstødd

**Valla áður hevur verið so stór undirtøka fyri eini innsavning, sum tann hjá Reyða Krossi leygardagin. Sjálvt um uppteljingin er liðug í skrivandi løtu, metir Suni Vinther, formaður í hjálparfelagsskapinum, at eini 500.000 krónur eru komnar í kassan**

INNSAVNING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

At føroyingar eru glaðir gevarar varð enn einaferð staðfest leygardagin, tá Reyði Krossur savnaði inn til neyðstødd. Undir yvirskriftini »Hús úr húsi« fóru á leið 350 innsavnarar við 370 bússum á dyrnar í húsarhaldum kring landið, og fyribils metingin sigur, at okkurt um ein hálv millión krónur eru savnaðar inn.

Í sambandi við innsavningina leygardagin høvdu Eik og Føroya Banka latið deildirnar upp í miðbýnum í Havn millum klokkan 15 og 16, so innsavnararnir kundu sleppa av við bússurnar við innsavnaða peninginum beinanvegin.

Fyribils uppteljingin vísir, at 215.925 krónur vóru komnar inn, ið gav eitt miðaltal upp á 2.250 krónur fyri hvørja bússu. Meir enn 300 bússur vóru í morgun eftir at telja upp, og tí roknar formaðurin fyri Reyða Kross, Suni Vinther, við at endaliga upphæddin fer at runda hálvu milliónina.

Reyði Krossur nýtir í hesum sambandi høvi til at takka innsavnarum, pengastovnum og fyriskiparum fyri teirra hjálp í sambandi við hús úr húsi-innsavningina.

Orsøkin til stóru undirtøkuna heldur Suni Vinther vera, at felagsskapurin kanska hevur verið meiri úti um seg, og at fjølmiðlarnir hava sett meiri ljós á innsavningina, enn tað onkuntíð fyrr hevur verið.

Innsavnaði peningurin fer óskerdur til hjálpararbeiði úti í heimi.




*Eins og aðrastaðni í landinum vóru fólk í Eysturbýnum í Havn gávumild. Hendan raska smágentan fekk yvir fimm túsund krónur í bússuna, tá hon saman við pápa sínum bankaði á dyrnar í økinum við Stoffalág. Tilsamans 5.039,75 krónur vóru í bússuni, tá hon varð tald upp í bankanum*

*Mynd: Kári Mikkelsen*

RUKO LÁSATÆNASTA
Ruko
- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem

Vit eru serkønir á økinum



VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ • TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20

## Gjald fyri valgreinar

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur t.e. 95 oyru fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**

Sosialurin